









# Nú hevur veljarin møguleikan



HEÐIN MORTENSEN
fólkatingsvalevni
Javnaðarfloksins

Týsdagurin 13. november kann gerast ein góður dagur, tí tá hevur føroyski veljarin møguleika at gera upp við tað, føroysku fólkatingsumboðini hava avrikað í skjótt trý ár. Hetta er einki minni enn ein gyltur møguleiki at seta nýggja leið út í kortið, tí tað er neyðugt.

Fólkafloksumboðið hevur verið nakað av tí gráasta og mest ósjónliga, føroyingar nakrantíð hava sent á fólkating, og tað hevur mesta partin av tíðini sæð út, sum var Anfinn Kallsberg bara ein av fleiri fullkomuliga anonymum tingmonnum hjá danska konservativa flokkinum.

Sigast skal so, at tjóðveldisumboðið hevur verið munandi sjónligari, uttan at tað harfyri hevur verið í serliga stóran mun sum eitt føroyskt umboð. Ferð eftir ferð hevur tú ivast í, um Høgni Hoydal var valdur í Føroyum ella í Grønlandi, tí grønlendsk áhugamál eru farin við tí nógva av tíðini.

Tað sigur seg sjálvt, at tá føroyingar skulu velja eitt umboð á fólkating, so má og skal talan vera um eitt føroyskt umboð, ið arbeiðir fyri Føroyum og føroyskum áhugamálum. Eingin orsøk er til, sum vit eisini hava sæð tað hetta valskeiðið, at flyta føroyskar ósemjur niður á fólkating, men at hava eitt virkið og dugandi umboð, ið fæst við realpolitikk.

Tí er neyðugt við nýggjum fólki á fólkatingi, ið umboðar allar føroyingar og stendur fyri breiðum samstarvi. Ábyrgd fylgir við einum fólkatingssessi, og ta ábyrgd fer eitt javnaðarumboð sjálvandi at umsita samvitskufult, við at vera eitt gott sambindingarlið millum Føroyar og Danmark.

Eitt valt javnaðarumboð fer fyrst og fremst at arbeiða eftir tí politiska veruleika, sum er galdandi, so rikin verður realpolitikkur á fólkatingi vegna allar føroyingar. Talan verður hvørki um gráa ella grønlendska umboðan, men eitt gott og virðiligt føroyskt umboð, velur tú Javnaðarflokkin!

# Framtíðin



EDITH DAHL
á lista C

Vælferðarsamfelagið Føroyar hevur tað betur enn nakrantíð. Hóast nógv økir í okkara samfelag treingja til meira, so eru framstig so at siga alla staðni. Nærum einki arbeiðsloysi er og tað tykist sum allir møguleikar til eitt enn betur samfelag eru til staðar.

Sosialdemokratski politikkurin og stevnan hevur alla tíð, síðan Javnaðarflokkurin var stovnaður, verið hóvligur og til frama fyri allar føroyingar og soleiðis skal arbeiðið hjá umboðið javnarfloksins eisini vera á Christiansborg.

Endamálið við slíkum hóvligum politikki er, at skapa Føroyum, okkum sjálvum og eftirkomarum okkara eina trygga og ljósa framtíð. Við Yvirtøkulógini kunnu vit, við okkara egnu raðfesting og ferð, á skynsaman hátt taka ræðið og ábyrgd av øllum málsøkjum.

Vit føroyingar kenna okkum sum eitt fólk, við serstøkum eyðkennum, ið rættvísgera ynski okkara um at vera ein tjóð, á jøvnum føti við aðrar tjóðir heimsins

Einaferð skulu Føroyar hava fult ræði í egnum landi. Tað tykjast tey flestu samd um. Men hetta má og skal gerast á skynsaman hátt, og eigur tilgongdin at taka ta tíð, ið neyðug er, soleiðis at tjóðini Føroyar eisini er lív lagað eftir møguliga skilnaðin frá Danmark.

Umboð javnaðarfloksins í danska fólkatinginum fara sum fremsta endamál, at hava jaligt samstarv við danir um sjálvstýristilgongd, ið á besta hátt tænir báðum tjóðunum.

Hetta er partur av mínari stevnu til fólkatingsvalið 13 november.

# Kjak um Gud



RÓALDUR JÁKUPSSON
fólkatingsvalevni
Tjóðveldi

Ymisk áhugaverd kjak inni á kjak.fo seta spurningar við, hvussu nógv kristindómur og onnur religión skal fylla í tí almenna rúminum í Føroyum.

Ein av kjak-tráðunum snúði seg um hvørt Zarepta er eitt paradís, ella ágangur ímóti børnum. Tráðurin hevur yvir 300 inlegg og fleiri av hesum innleggum eru fyrstahondsupplivingar frá fólki, sum hava verið á legum og fingið eina skelkandi uppliving, sum hevur merkt tey. Dømir eru td. um ung børn, sum á miðjari nátt eru leidd inn í eitt kamar við einum ungdómsleiðara, sum hevur sett sær fyri at ræða hetta barnið til at umvenda seg, td. við at siga: "Um tú ikki vendir um og tekur ímóti Jesusi beinan vegin, so fert tú at brenna upp í Helviti í allar ævir", ella við at kroysta tey upp at vitna frammanfyri eini stórari forsamling, ella við marathon bøn uppá fleir tímar osv.

Nú er tað einaferð so, at foreldur ráða fyri hvussu børnini verða uppdrigin. So man kann sum foreldur sjálvandi bara velja, at nokta sínum barni at fara á hesar legur. Men hvat við teimum børnum, sum eru fødd og uppvaksin í hesum umhvørvinum, har tey verða indoktrineraði við bibliuni sum hægstu lóg? Hvør verjir tey? Hava tey nakrantíð haft eitt frítt val?

Greinar og lesarabrøv hava seinastu tíðina varpað ljós á, hvussu lágt religiónskjakið er í Føroyum í dag. Vit eru á einum støðið, har fólk ikki enn tora at traðka fram og siga, at tey ikki trúgva uppá Gud. Darwin er eitt av ljótastu banniorðum í Føroyum. Summi halda at kristna afturhaldni er ein forðing fyri menning í Føroyum, meðan onnur siga at uttan kristni trúnna, so er ongin moralur og ongin vón.

Persónliga eri eg sera liberalur á økinum. Eg haldi at einhvør skal sleppa at trúgva uppá hvat man hevur hug til, og einhvør skal kunna virka í samfelagnum sum man hevur hug til. Eingin skal blanda seg uppí persónligu trúnna hjá tí einstaka. Og eg haldi at jú meira ymisk vit eru jú betur og meira spennandi er samfelagið at liva í. Men farligu spurningarnir, sum nú verða kastaður út, og sum eg vóni kunnu skapa eitt kjak, eru so um tað er í lagi at tvinga børn at ummvenda seg til eina trúgv, sum í døminum við Zarepta? Hví skal eitt óskyldugt barn indoktrinerast í eini tilvildarligari trúgv ímillum fleiri túsund aðrar? Er eitt bibliu sitat ein nóg góð grundgeving fyri nakað sum heldst? Onkur kjakari nevnir, at tað ikki er loyvt at buka og misbrúka síni børn, men vísur so á at sálarliga misnýtslan so sanniliga eisini er sera skaðilig, men tó lóglig?

Í dag kann tað saktans henda at man í Úf, Rás2 og Lindini samstundis hoyrur andaligar sendingar. Í Løgtinginum kann man uppliva sitatir úr bibliuni, sum argumentatión fyri einum og hvørjum evni. Bløðini eru full við lýsingum um møtir kring alt landið. Kirkjur og samkomuhús spretta upp sum hundalond. Hevði tað ikki verið spennandi at fingið eitt ordiligt kjak um hvat vit vilja við religión í Føroyum? Religión er ein so stórur partur av okkum, at pláss eigur at vera fyri einum siðiligum kjaki um hetta.

Onkur kann so svara at ikki øll møtir eru so og so, og ikki allar legur eru so og so, og ikki allar religiónir eru so og so, ikki allir leiðarar eru so og so, osv. (rættiliga vanlig argumentatión á kjak.fo) Sjálvandi er tað ikki altíð so og so. Men tað hendur onkuntíð, og einaferð er alt ov nógvaferð vildi onkur sagt. So lat okkum lyfta kjakið upp á eitt hægri støði hesuferð.

Hetta lesarabrævt skal ikki tulkast sum eitt álop á nakran, ei heldur sum ávaring ímóti Zarepta, sum sikkurt ger nógv gott. Men skal heldur skiljast sum eitt sunt tekin uppá at vit eru sera ymisk í Føroyum. Modernaði fólk eru individualistar, sum ikki dáma propaganda og heldst vilja velja at inrætta síni persónligu viðurskifti sjálvi uttan at hava eina indoktrinering við í sjáttuni. Vit eru øll føroyingar, og her skal vera pláss fyri okkum øllum, og jú meira fjøltátta vit eru jú betur.

Inni á kjak.fo er loyvt at vera anonymur og kjakast verður tí um mangt og hvat, og til tíðir rættiliga harðliga, men kjakararnir eru tó sum oftast siðiligir og virða hvønn annan. Vónandi kunnu vit øll onnur í Føroyum eisini fáa eitt virðiligt kjak um hetta sera áhugaverda evnið.

# Fyri seinastu ferð



VILHELM JOHANNESEN
løgtingsmaður og
fólktingsvalevni

Undirritaði hevur fyri langari tíð síðani boðað frá, at eg ikki stilli upp til komandi løgingsval, sum veður í seinasta lagi 13. januar 2008.

Kortini havi eg tikið av tilboðunm, um at standa á valevnislista javnaðarfloksins til fólkatingsvalið, sum verður týsdgin 19. november. Hetta verður sostatt seinastu ferð, at tit veljarar havi høvið at sýna mær álit, og tað gera tit við at geva mær atkvøðuna.

Eg havi drúgvar royndir í politikki. Varð valdur í Klaksvíkar býráð í 1974 og sat sum býráðslimur í 10 ár. Í hesum tíðarskeiði var eg eisini formaður í Føroya Kommunufelag í tvey ár. Í sjeytiárunum var eg ábyrgdarblaðstjori á SOSIALINUM. Hetta var frá 1. januar 1972 til eg gjørdist landsstýris-maður 20. nov-ember 1979.

Tvær ferðir havi eg umboðað Javnaðarflokkin í landsstýrinum. Báðu ferðina saman við Atla Dam, sála, ið var løgmaður. Fyrru ferð frá 20. november 1979 til 5. januar 1981 og seinnu ferðina frá 10. januar 1985 til 18. januar 1989. Tað kundu verið mong og glæslig úrslit at víst á frá hesum tíðarskeiðum. Men lat tað liggja á hesum sinni.

Kortini er tað eitt mál, sum eg má taka fram, og er tað Samhaldsfasti Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin. Hetta var eitt av úrslitunum í tí seinna landsstýrisskeiðnum. Eitt úrslit, ið eg eri sera fegin um, nú útgjaldið úr grunninum frá 1. januar 2008 veður góðar 2.200 kr. til hvønn um mánaðin. Henda upphædd fer bert at vaksa í framtíðini.

Eg varð valdur í løgingið á løgingsvalinum í november 1980. Í 27 ár eri eg valdur og afturvaldur átta ferðir. Eg kom fyrstu ferð á valevnislistan til fólkatingsval í 1979. Á hesum valinum gjørdist eg varafólkatingsmaður við 865 persónligum atkvøðum. Ta ferðina varð Jacob Lindenskov valdur í fólkatingið. Hann tók við aftaná Jóhan Nielsen, sála.

Nú bjóði eg meg so fram fyri seinastu ferð. Samstundis sum eg heiti á tykkum um at stuðla meg á valinum, vil eg nýta høvi til at takka tykkum øllum, fyri tað alit og tað trúfesti tit hava sýnt mær øll hesi árini. HJARTALGA TØKK ØLL SOMUL.

At enda skal eg heita á tykkum, um at veita mær stuðul á hesum valinum eisini. Eg ynski tykkum øllum eitt gott val – og eitt gott val fyri føroyska samfelagið, er eitt gott javnaðarval.